# Gongur framá við leigusáttmálanum

**- Vit eru í prinsippinum samdir um eina leiguavtalu av seks skipum og nøkrum virkjum, men enn er avtalan ikki vorðin virkin, tí nakrar treytir skulu uppfyllast, sigur Eyðfinnur Jacobsen, bústjóri**




*Skipini, sum eru við í leiguavtaluni, eru Bakur, Stelkur (mynd), Heykur, Falkur, Rókur og Lerkur*
Mynd: Vilmund Jacobsen

Vilmund Jacobsen

Fríggjadagin, tá Skiftirættarfundur var um samtakið Faroe Seafood, kom fram, at ein leigusáttmáli lá klárur til undirskrivingar millum ein "aktør" í føroysku fiskivinnuni og trotabúgvið eftir Faroe Seafood.

**...flestu veðhavarar aftanfyri trotabúgvini hava givið sítt viðmæli...**
EYÐFINNUR JACOBSEN

Sáttmálin snýr seg um, at aktørurin vil leiga teir seks ísfiskatrolararnar í dóttirfelagnum Faroe Fish II, eins og aktørurin eisini ynskir at leiga nøkur av fiskavirkjunum í trotabúnum.

### Nakrar treytir

Eyðfinnur Jacobsen, bústjóri, sigur, at partarnir í prinsippinum eru samdir um leigusáttmálan, sum kortini ikki er vorðin virkin enn.

- Enn eru nakrar treytir, sum skulu uppfyllast, og eitt nú skulu ávís viðurskifti í sáttmálanum góðkennast av Fiskimálaráðnum. Flestu veðhavarar aftanfyri trotabúgvini hava eisini givið sítt viðmæli, men enn vantar onkur góðkenning.

Bústjórin sigur, at teir hava undirskrivað leiguavtaluna vegna trotabúgvini.

- Men vit hava treytað okkum, at nøkur viðurskifti koma upp á pláss, og tað er ikki óvanligt, at ein endalig avtala verður broytt samsvarandi hesum.

Eyðfinnur Jacobsen heldur, at tað gongur framá at koma undir land við eini avtalu, sum kann bera á mál.

### Skip og virkir

Tey seks skipini, sum eru í Faroe Fish II, eru Stelkur, Bakur, Heykur, Falkur, Rókur og Lerkur. Hetta felag er farið á húsagang, og tað eru hesi skipini, sum nevndi aktørur vil leiga saman við nøkrum virkjum.

Eyðfinnur Jacobsen vil framvegis ikki siga, hvør aktørurin er, og bústjórin vil heldur ikki siga, hvussu nógv fiskavirkir talan er um, sum aktørurin hevur áhuga í at leiga.

- Men talan er um nøkur virkir, sigur bústjórin.

# Ognirnar hjá trotabúnum skulu seljast




*Virksemi hjá landingarmiðstøðini Kongshavn er nógv minni, nú seks av ísfiskatrolarunum, sum løgdu fiskin upp í Saltangará, liggja. Men tað er ikki vist, at hesi skip koma at liggja so leingi*
Mynd: Vilmund Jacobsen

**- Tær ognir hjá Faroe Seafood, sum kunnu seljast fyri ein prís, sum búgvið og veðhavarar góðtaka, fara ikki á tvingsilssølu, sigur Eyðfinnur Jacobsen, bústjóri**

Vilmund Jacobsen

Tað er ikki vist, at so stórur partur av Faroe Seafood endiliga fer um eina tvingsilssølu, tá samanum kemur.

Eyðfinnur Jacobsen, ein av bústjórunum, sigur, at finnast keyparar til ognirnar fyri ein prís, sum búgvið og veðhavarar kunnu góðtaka, verða hesar seldar í fríari sølu og noyðast soleiðis ikki um eina tvingsilssølu.

- Okkara uppgáva er at avvikla búgvini og realisera ognirnar, sigur bústjórin.

Fríggjadagin kom fram, at ítøkiligt uppskot er um leigu av skipum og virkjum, sum vóru partir av Faroe Seafood.

Nógv bendir tí á, at tey seks skipini í Faroe Fish II, ikki verða liggjandi leingi, eins og nøkur av virkjunum koma uppaftur at koyra, áðrenn langt um líður.

Partrolararnir, Jaspis og Ametyst, sum eru í felagnum Faroe Fish I, eru til fiskiskap, og djúpvatnstrolarin Edna er heldur ikki farin av knóranum.

Higartil hevur landingarmiðstøðin Kongshavn í Saltangará, sum er dóttirfelag hjá Faroe Seafood, eisini landað fisk og tey fólk, sum arbeiða har, eru framvegis í starvi.

Men nú seks av ísfiskatrolarunum, sum burturav landaðu í Saltangará, liggja, er virksemið hjá Kongshavn nógv merkt av hesum.

*vilmund@sosialurin.fo*